# Sunnudagur 11. november

**SvF**

14.00 Sjáldsomu verkini hjá einum listamanni
14.10 Dansararnir, ein kinesisk søga
14.20 Einglar gera um seg – amerikanskur filmur
16.00 Gudstænasta úr Vestmanna kirkju
17.10 Rangt og rætt 4:8 (e)
17.50 Grauballemaðurin 2:2 – Søren Ryge greiðir frá
18.30 Smásøgur
18.35 Jumanji 29
19.00 Emily á Veðurgarðinum
19.50 Andakt við Símin Ósá
20.00 Sangir frá Fjallafonn
20.50 Working Girl – amerikanskur kærleiksfilmur
22.40 Kærleikssøgur aldarinnar: Lili Palmer og Rex Harrison
23.05 Bókatátturin
23.35 Liðugt

**Eurosport.com**

07:30 Football
08:00 Football
09:00 Bobsleigh (Live)
10:00 Football
11:00 Bobsleigh (Live)
12:00 Weightlifting (Live)
14:00 Football
15:00 Football
16:00 Football
16:45 News
17:00 Football
18:00 Football
19:00 Football (Live)
21:00 Nascar
22:00 News
22:15 News
22:30 All Sports
23:00 Weightlifting
00:15 News
00:30 Close

**BBC Prime**

0.30 TLZ: »Ever Wondered?«
0.55 TLZ: »Mind Bites – Mindbites Health«
1.00 TLZ: »Philosophy In Action – Debates About Boxing«
1.30 TLZ: »Theory And Practice«
1.55 TLZ: »Adagio For Strings«
2.00 TLZ: »The Celebrated Cyfarthfa Band«
2.25 TLZ: »Music E. Motions - Eternal Father«
2.30 TLZ: »Castaway – Rough Science«
3.00 TLZ: »Open Advice: Exam Success«
3.30 TLZ: »Rapid Climate Change«
4.00 TLZ: »Reindeer In the Arctic«
4.25 TLZ: »Bites – Science Bites – The Leopard's Spots«
4.30 TLZ: »Large Scale Production«
4.55 TLZ: »Pause«
5.00 TLZ: »Asteroid Hunters«
5.30 TLZ: »The Chemistry of Power«
5.55 TLZ: »Bites – Science Bites – Virtual Evolution«
6.00 Bodger and Badger: »Mrs Dribelle's Big Day«
6.15 Playdays: »The Patch Stop«
6.35 Smart on the Road: »Competition Winners«
6.50 Bodger and Badger: »Mrs Dribble and the Queen«
7.05 Playdays: »The Whybird Stop«
7.25 Steps To the Stars
8.00 Top of the Pops Prime
8.30 TOTP Eurochart
9.00 Festival of Remembrance
10.30 Remembrance Sunday – The Cenotaph
12.00 Ground Force: »Lancaster
12.30 Are you being served?: »The Sweet Smell of Success
13.00 Eastenders Omnibus
13.30 Eastenders Omnibus
14.00 Eastenders Omnibus
14.30 Eastenders Omnibus
15.00 Grange Hill Omnibus
16.00 Jonathan Miller's Opera Works: »The Death Scene«
16.45 Cardiff Singer of the World 1999 – The Final
18.00 Ainsley's Gourmet Express: »Sushi & Noodles«
18.30 Fawlty Towers: »Gourmet Night«
19.00 The Boss: »Desperately Seeking Susan«
19.30 Porridge: »Happy Release«
20.00 Murder Most Horrid: »Murder at Teatime«
20.30 The Royle Family
21.00 The Fast Show
21.30 Harry Enfield And Chums
21.55 A Bit of Fry And Laurie
22.30 Aristocrats
23.30 Dr. Who: »Attack of the Cybermen«

**BBC World**

0:00 BBC News
0:30 This Week (r)
1:00 BBC News
1:30 Reporters
2:00 BBC News
2:30 Europe Direct (r)
3:00 BBC News
3:30 Correspondent (r)
4:00 BBC News
4:30 Talking Point (r)
5:00 BBC News
5:30 Asia Today Special (r)
6:00 BBC News
6:30 Reporters (r)
7:00 BBC News
7:30 Panorama (r)
8:00 BBC News
8:30 This Week (r)
9:00 BBC News
9:10 The Planets (r)
10:00 BBC News
10:30 Click Online (r)
11:00 BBC News
11:30 Europe Direct (r)
12:00 BBC News
12:10 People's Century (r)
13:00 BBC News
13:10 Dateline London
14:00 BBC News
14:30 Reporters (r)
15:00 BBC News
15:10 Art That Shook The World (r)
16:00 BBC News
16:30 This Week (r)
17:00 BBC News
17:10 Talking Islam: Jihad (r)
18:00 BBC News
18:30 Reporters (r)
19:00 BBC News
19:30 Europe Direct (r)
20:00 BBC News
20:10 People's Century (r)
21:00 BBC News
21:30 The War Report
22:00 BBC News
22:30 Dateline London (r)
23:00 BBC News
23:30 Reporters
23:45 Asia Today

**TV 3**

05:25 Børne-hjørnet med Disney
09:10 Skat - børnene er skrumpet(G)
10:00 Barnemad(G)
10:30 Luftens helte(G)
11:25 Mig og fremtiden
12:20 Amors pile
13:15 Felicity
14:10 Pernilles Univers
15:10 En chance til
16:05 Heksene fra Warren Manor(G)
17:00 Harem 2001(G)
18:00 Morten Olsen - mod nye mål
18:30 Den Sande Mester
19:00 Tve-kampen
20:00 Søndagsfilmen: Sidste nedtælling
22:25 Natten er lang
00:05 Lægerne
01:05 Walker, Texas Ranger
02:05 Sunset Beach (G)
02:55 Sunset Beach (G)
03:45 Godnat

**ÚF**

10.00 Tíðindi
10.05 Sunnudagsløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis.
10.30 Sálmar og sangir (e) - Úr Alla halganna konsertini hjá Kirkjukórinum Ljómi í Vági sunnudagin 4. november. Janus Mohr leggur til rættis.
11.00 Lestur - Katrina Svartá, í Hvalvík, lesur
12.10 Crescendo (e) - Kári Olsen stílar fyri
13.10 Høgtíðir og veitsluhald á vetri - Ove Olsen lesur úr bók eftir Robert Joensen. 1. partur.
13.40 Enn tónar strongur - Føroyskir sangir. Janus Mohr leggur til rættis
14.00 Tíðindini
14.15 Fram við ánni - Jónheðin Tróndheim leggur til rættis
15.00 Kvøðuljómar
16.00 Fólk og frítíð (e) - Gunnar Nolsøe skipar fyri
17.00 Tónar og greinir (e) - Birgar Johannsen leggur til rættis
18.00 Vísusangur
18.30 Tíðindi
18.40 Ítróttatíðindi
19.00 Politiskt orðaskifti - Eitt umboð fyri hvønn listan til fólkatingsvalið luttekur. Røðararnir fáa 12 minuttir tilsamans og velja sjálvir, hvussu teir brúka tíðina. Tó verður eitt fyrsta umfar, har flokkarnir fáa orðið í somu raðfylgju, sum framløgusendingarnar í næstu viku verða sendar í.
20.30 Samfelagsstevna á Hálsi - Sending frá evangeliskum fundi í Ítróttar- og Samkomuhøllini í Havn.
22.00 Liðugt

**Rás 2**

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Gospeltónleikur
13:00 Kelduvaðið (EvR) - Páll og Maria Poulsen siga frá um kristniboðan - Osvald Kjærbo talar um "Kristus í Hebrearabrævinum" (8. og seinasti partur)
14:00 Føroyskir sangir og sálmar
15:00 Tónleikur
16:00 Barnarásin - Oddbjørg og Lissi leggja til rættis
16:30 Tónleikur
17:00 Ymiskt á leiðini (e) - Endursending frá týsdegnum - Malmberg Olsen hevur samrøðu við Sørin Jacob Lamhauge, Rituvík
18:00 Tónleikur
20:00 Kelduvaðið (EvR) - Endursending frá kl. 13.00 í dag - Páll og Maria Poulsen siga frá um kristniboðan - Osvald Kjærbo talar um "Kristus í Hebrearabrævinum" (8. og seinasti partur)
21:00 Tónleikur
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Tónleikur
00:00 Liðugt

**Lindin**

09.00 Byrjan - Dagsskrá
09.05 Lovsangur
09.30 Barnalindin, beinleiðis sending úr studio A, vertur Lív Jacobsen
10.00 Okkara dagliga breyð
12.00 Útvarpsmøti
13.00 Dagsskrá verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Lovsangur
14.30 Barnalindin (e)
15.00 Sjómanssendingin Vitin v/ M.C. Restorff (e)
16.00 Teldan velur løg.
17.55 Dagsins orð, eftir Svenning av Lofti.
18.00 "Tónleikur fyri tilkomin" (e)
20.00 Barnalindin (e)
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
21.00 Útvarpsmøti (e)
22.55 Dagslok - Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Vit gevast

## Fram við ánni

**ÚF Sunnudagin kl. 14.15**

Ein tann kendasta áin í Føroyum kann vera áin í Kollafjarðardali. Hon er kanska ikki so kend av umtalu, men so at siga øll fólk í landinum hava sæð hana meir enn einaferð. Tey eru kortini fá, sum hava verið ánni nærri enn í einum bili. Í sendingini "Framvið ánni" vitjar Jónheðin Tróndheim á støðum, sum hava samband við ánna í Kollafjarðardali. Sunnudagin kl. 14.15

## "Rangt og rætt" 4 (8) (e)

**SvF Sunnudagin kl. 17.10**

Rangt og Rætt er sendingin, har kappast verður í bæði orðum, tónleiki og lutum. Mergjaði føroysk orð verða havd á lofti, og so hoyra vit tríggjar frágreiðingar um hvørt orðið. Tvær eru skeivar, og tað ræður um at gita ta røttu frágreiðingina. Liðskiparnir báðir manna liðini við kendum fólkum, sum royna at lirka og lumpa seg ígjøgnum kappingarnar. Tað liðið, sum samanlagt vinnur kappingarnar vinnur eisini eitt jólaborðhald í desember.Vertur í sendingunum er Leivur Hansen.

*Lagt til rættis: Hans Petur Hansen, Leivur Hansen, Ivan Niclasen, Regin D. Patursson.*

*Programleiðari: Ivan Niclasen.*

*Vertur: Leivur Hansen.*

## Sangir frá Fjallafonn




Nakrir av teimum bestu sangunum vit eiga á føroyskum eru skrivaðir av Hans Andreas Djurhuus. Barnarímur sum »Lítli beiggi« og »Kongaríkið í Bábylon« eru kendar av hvørjum mansbarni, eins og sjómansrímurnar eisini eru vorðnar fólkaogn. Í sendingini skulu vit hoyra nakrar av hesum vælkendu sangum framførdar av navnframum sangarum sum eitt nú Eivør Pálsdottir, Rúna Brattaberg, Úlvi við Høgadalsá, Hans Iversen og øðrum. Sangirnir vórðu framførdir til eina kvøldsetu í Sjónleikarhúsinum, har yrkingar og sjónleikur eftir Hans Andreas Djurhuus vóru á skránni. Tað var Hanus Kamban, sum legði kvøldsetuna til rættis í samband við sjónvarpssendingarnar »Lítli maður frá Fjallafonn«.

*Lagt til rættis: Hanus Kamban og SvF.*

## All Night Long

*- amerikanskur filmur frá 1981*




Gene Hackman og Barbra Streisand spæla høvuðsleiklutirnar í hesum heilt serliga skemtifilmi. George Duppler er leiðari fyri eitt apotek, og hansara tilvera er ein keðilig forstaðstilvera. Í einum útslagi av panik og uppreistrarhuga, so ger George av, at hann fer at fjasa við húsmóðurina Cheryl, og hetta gerst byrjanin til nógv spennandi og skemtiligt.



**UTTAN ÚR HEIMI**

# Skaðiligt valstríð í Danmark

**Sum væntað hevur spurningurin um innflytarar og flóttafólk fylt ein stóran part av valstríðnum í Danmark upp undir fólkatingsvalið. Og nú tala arbeiðsgevararnir at**

ÚTLAND

Orðaskiftið hevur eins og upp undir undanfarin fólkatingsval snúð seg um, hvussu mangir útlendingar skulu hava loyvi at koma til Danmarkar, og hvussu tey, sum longu eru komin, skulu fáast inn í tað danska samfelagið.

Orðalagið hevur verið alt annað enn sakligt. Á ytsta høgravogninum tosar Mogens Glistrup um at savna muhammedanarnar í legur og at selja muhammedansku kvinnurnar av landinum fyri at fáa eitt sindur av pengum í ríkiskassan.

Hetta sjónarmið er hann einsamallur um, men flestu flokkar eru tó fyri at tátta reglurnar fyri at avmarka talið á innflytarum og flóttafólkum og at fáa tey, sum eru komin til Danmarkar, at laga seg til danska samfelagið.

Í hesum sambandi hevur serliga verið tosað um, at nógvir sonevndir nýdanir framvegis fáa sær konu úr teimum londum, foreldur teirra einaferð fluttu úr. Tað eru serliga turkar, pakistanar og menn úr Somalia, sum finna sær konu í heimlandinum hjá foreldrunum. Flestu politikararnir eru á einum máli um, at hetta er skeiv mannagongd, tí á hendan hátt verða tað støðugt fólk, sum ikki kenna danska samfelagið, ikki skilja danska málið og tískil fáa trupult við at koma inn í danska samfelagið. Men hóast flestu politikararnir eru samdir, eru teir ósamdir um, hvat skal gerast.

### Skaðiligt

Nógvir politikarar eru samdir um, at spurningurin um nýdanirnar hevur fingið alt ov stóra rúmd í valstríðnum, og at fleiri týðandi politisk mál tí næstan ikki verða tikin upp á tunguna í valstríðnum. Eitt nú verða skattamál valla nevnd, hóast tann vanligi danin kennir seg illa tyngdan av skatti.

Nú tala arbeiðegevararnir eisini at. Blað teirra, Erhvervsbladet, skrivaði í gjár, at fleiri arbeiðsgevarar vísa frá sær tað nógva tosið um tey fremmandu í Danmark. Orðaskiftið órógvar tey fremmandu á arbeiðsplássinum, skrivar blaðið og leggur afturat, at tað mangan ódámliga orðalagið kann fáa útlendingar við góðari útbúgving at leita sær aðrar vegir enn til Danmarkar.

-Vit taka als ikki undir við orðalagnum um hesi fólkini. Hetta er at jagstra fólk, sum eru neyðug sum arbeiðsmegi í Danmark. Vit eiga eisini at minnast til, at tað eru tey bestu, sum eru komin higar, sigur stjórin á einari maskinverksmiðju á Amager, sum sjálvur hevur 45 nýdanir millum tey 70, sum arbeiða á verksmiðjuni.

Stjórin á einari gummiverksmiðju í Århus hevur somu hugsan.

-Tað harmar meg, at teir dugnaligu nýdanirnir, sum arbeiða hjá okkum, verða so meint raktir av hesum orðalagnum, sigur hann við Erhvervsbladet.

**(Fartekst)**

# Roykjari fær 200 mió. í endurgjaldi

Ein 55 ára gomul krabbameinssjúk kvinna í Los Angeles í USA skal hava 200 mió. krónur í endurgjaldi frá tubbaksverksmiðju.

Patricia Henley byrjaði at roykja sum 15 ára gomul. Í 26 ár roykti hon tríggjar pakkar av Marlboro-sigarettum um dagin. Í 1997 legði hon av, tí heilsan var farin at bila, og stutt eftir staðfestu læknarnir, at hon hevði fingið lungnakrabba.

Hon gjørdi seinni av at leggja sak ímóti fyritøkuni Philip Morris, sum ger Marlboro-sigarettirnar, og mikudagin dømdi ein dómstólur fyritøkuna at rinda henni 200 mió. krónur í endurgjaldi.

Rætturin dømdi Philip Morris at rinda endurgjald, tí fyritøkan hevði ikki ávarað um vandan av royking og fyri at hava dult upplýsingar um, at royking er skaðilig og vanaelvandi.

Undir rættarmálinum vísti Philip Morris á, at at fyritøkan ongantíð hevur sagt, at roykjarar skulu kenna seg tryggar, og at fyritøkan kundi ikki taka ábyrgdina av, at Patricia Henley var farin at roykja.

Endurgjaldið til Patriciu Henley kann tykjast stórt, men tað er lítið samanborið við tað, sum tann 56 ára gamli Richard Boeken fekk viðhald í fyrr í ár. Í tí málinum avgjørdi rætturin, at hann skuldi hava 20 mia. krónur í endurgjaldi. Eisini ta ferðina var tað Philip Morris, sum varð dømt at gjalda.


## Sølufólk

Fyri Snørisvirkið í Klaksvík søkja vit eftir dugnaligum fólki til at taka sær av søluarbeiðinum. Fyritøkan selur fiskireiðskap og sjó-og arbeiðsklæði til fiskivinnu á sjógvi og landi, og annars til virkir og fólk sum heild. Á fyritøkuni starvast í dag 5 fólk.

**Uppgávur:**
Starvið er fjølbroytt, og arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum hesar:

- at aktivt seta seg í samband við møguligar kundar bæði skrivliga og við kundavitjanum
- at samskifta við kundar, sum venda sær til fyritøkuna
- at veita verandi kundum eina góða ráðgeving og tænastu
- at verða við til, saman við leiðsluni at leggja marknaðarætlanir fyri fyritøkuna

**Umsøkjarar:**
Vit søkja eftir einum persóni, sum er positivur, dámar væl og hevur evni at samstarva við onnur og annars er ágrýtin og hevur gott hugflog. Samstundis vænta vit, at viðkomandi dámar væl at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst og ikki er bangin fyri nýggjum avbjóðingum. Umsøkjarar við royndum innan sølu og í nýtslu av teimum mest vanligu telduforritunum hava fyrimun, men hetta er tó ongin treyt.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

Umsóknir verða sendar skjótast gjørligt, og í seinasta lagi fríggjadagin 23. november 2001 til: **Virkisráðgeving Spf., Boks 26, 600 Saltangará.**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Virkisráðgeving Sp/f, tlf. 44 95 91 og tosa við Sigvør Laksá ella Símun Hammer. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Virkisráðgeving Spf**
Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - **Rekruttering** - Góðsku-/Umhvørvisskipanir
Heimasíða: http://www.konsult.fo





